## Steypakapping á Stórheyggi

Seinna av tveimum steypakappingum í amboðsfimleiki verður í høllini á Stórheyggi í Han nú leygardagin klokkan 14. Til hesa kappingina kappast kvinnuunglingar og kvinnur í amboðinum: Biti. Menninir kappast í amboðunum: Beinsveiggi og Paralell Barr.



## Inniróður um vikuskiftið

Havnar Róðrarfelag hevur gjørt av, at Formula-kappingin í inniróðri nú verður hildin um vikuskiftið, soleiðis sum ætlanin upprunaliga var. Fyri viku síðani boðaði felagið annars frá, at kappingin varð útsett til 20. mars, men nú verður aftur sagt, at kappingin verður hildin leygardagin, 27. februar. Orsøkin til ætlaðu flytingina var, at tilmeldingin í ávísum bólkum var ov lítil, men heldur enn at útseta gjørdi felagið ístaðin av at leingja freistina fyri tilmelding.

# Christian hevði ikki sloppið í 2010

**Á aðalfundinum hjá FSF verða kappingarreglurnar ætlandi broyttast, soleiðis at tað nú verður staðfest, hvørji undantøk eru fyri flyting av spæliloyvum uttan fyri flytingarvindeyga**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Tað kann væl vera, at Cristiano Ronaldo fekk nógv pláss í miðlunum, tá hann í summar skifti til Real Madrid, men her heima var tað tó fyri einki at rokna móti tí, sum var at hoyra um flytingina hjá Christiani Restorff Mouritsen.

Grein 17 í kappingarreglunum gjørdist mest sum gerandisorð hjá fótbóltshugaðum føroyingum, og valla fanst tann fjepparin, ið ikki hevði eina meining um avgerðina, sum loyvdi spælaranum at skifta til B36, sum hevði gloymt at sent umsóknina um flyting av spæliloyvinum inn, áðrenn flytingarvindeyga klamsaði aftur á ólavsøku.

Grundgevingin, sum Kappingarnevndin nýtti, var, at spælari kundi flyta uttan fyri flytingarvindeyga, um talan var um heilt serligt føri. Og nevndin metti, at talan her var um serligt føri

Eitt upprit frá løgfrøðingi staðfesti annars, at í fyrsta lagi átti ein nágreinan av hugtakinum »heilt serligt føri« at gerast, og hartil metti juridiska ráðgevingin ikki, at B36 hevði grundgivið fyri, hví talan var um serligt føri.



Hóast hann at enda slapp at skifta felag, so er eingin ivi um, at Christian Restorff Mouritsen heldur enn fegin vildi verið alt fjølmiðarokið fyriuttan, tá hann gjørdi av at fara úr HB til B36. Nú er ætlanin, at ein dagføring av kappingarreglunum skal áseta púra greiðar treytir fyri, nær talan er um serligt føri og ikki

Og skal metast eftir lógarbroytingini, sum nú verður løgd fyri aðalfundin, so var talan eftir øllum at døma ikki um serliga serligt føri. Skotið verður nevnliga upp, at flytingar av hesum slag bert er loyvdar, um talan um flyting av málmonnum ella tá felag er farið á húsagang ella hevur mist luttøkuloyvi. Hartil stendur tað Kappingarnevndini frítt at frítaka ávísar deildir frá regluni.

## Greiðari kappingartreytir

Eitt av trætumálunum, sum sá dagsins ljós móti kappingarenda, var viðvíkjandi kappingin í aðru deild, har B71 tók liðið úr kappingini.

Her valdi Kappingarnevndin, at dystirnir móti B71 ikki skuldu strikast, og tað skapti ónøgd hjá AB, ið var tað einasta av oddaliðunum, sum hevði mist stig móti sandoyingunum.

Nú er ætlanin, at grein 12 í kappingarreglunum skal strammast upp, soleiðis at tað er púrasta greitt, hvørjar avleiðingar tað fær fyri kappingina, um felag velur at taka liðið út. Nakað sum tað fyrr hevur verið upp til Kappingarnevndina at taka støðu til í hvørjum einstøkum føri.

Bæði tá felag sjálvboðið tekur lið úr kappingini, og tá lið verður koyrt úr kappingini, tí uppmøtingin til dystir ikki hevur verið nógv góð, verður avleiðingarnar nú settar eftir, hvussu væl kappingin er komin ávegis.

Er helvtin ella minni enn helvtin av kappingini spæld, skulu allir dystir hjá avvarandi felag strikast, meðan stig og mál hinvegin standa eftir, um farið er um helvtina av kappingini, tá lið verður tikið ella koyrt út. Í seinna førinum verður hartil galdandi, at allir eftirfylgjandi dystir hjá liðnum verða taptir 3-0.

**-mørk**

# Dýrari landslið og dómarar

**Størri og drúgvari landsliðssamlingar, ein dýrari venjari og øktar lønarútreiðslur til dómararnar er partur av frágreiðingini handan dapra FSF-roknskapin**

Í blaðnum í gjár staðfestu vit, at talan verður um hall upp á hálva sjeyndu millión, tá roknskapurin fyri 2009 verður lagdur fram á aðalfundinum hjá FSF.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerking til hesi tøl undan evstamarki okkara, men eftir døgurða í gjár segði virkandi aðalskrivarin, Virgar Hvidbro, at frávikini høvdu sínar avgjørdu orsøkir.

– Ein av tungu postunum er landsliðsarbeiðið, har frávikið er heilt stórt. Eisini um tær gott og væl fimm milliónirnar í bonus-upphædd verða frároknaðar.

– Her er ein stórur partur av frágreiðingini, at útreiðslur til A-landsliðið vóru óvanliga stórar í fjør. Vit høvdu ein nýggjan venjara, sum ikki er bíligari enn fyrrverandi vernjarin. Og fyrsta samlingin hjá honum var drúgvari enn vanligt, eins og hon eisini innihelt fleiri spælarar, enn vanligt er. Vit gjalda jú dagpengar til spælararnar, og tí kostaði tann samlingin væl meira enn vanligt. Hartil var talan eisini um 22-manna hóp, sum fór til Fraklands og Rumenia, og fýra persónar eyka kosta altso í ferðing, uppihaldi og dagpengum, sigur Virgar Hvidbro.

– U21-landsliðið kostaði eisini nógv, men her var støðan tann, at 10 av teimum 12 dystunum í hesi undankappingini vórðu spældir í 2009, og tí verður tann útreiðslan munandi minni í 2010.

– Viðvíkjandi umsitingini, so er største frávikið her, at semja í fjør varð gjørd um, at FSF rindar helmingin av dómaraútreiðslunum til mansdystir, har FSF ásetur dómaran, og allan kostnaðin til kvinnudystir. Hetta eru útreiðslur, sum áður hava ligið á feløgunum, og tá semjan varð gjørd, eftir at fíggjarætlanin varð løgd fram, hevur hetta ávirkað negatívt við á leið 800.000 krónum, sigur Virgar Hvidbro.

**-mørk**